Nr. 82/2019

Hervør Pálsdóttir
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um ungdómsarbeiðsloysi, settur landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvat ætlar landsstýrið at gera fyri at fyribyrgja ungdómsarbeiðsloysi í sambandi við koronakreppuna?
2. Hvat er aldursbýtið á teimum, ið eru í serligu korona ALS-skipanini?
3. Hvussu er landafrøðiliga býtið av teimum, ið eru í serligu korona ALS-skipanini?
4. Hvussu eru tey, ið fáa útgjald eftir serligu korona ALS-skipanini, býtt á vinnugreinir?

Viðmerkingar:
Almennu tilmælini í sambandi við COVID-19 hava havt við sær, at serliga tænastuvinnan er hart rakt. Stórt ungdómsarbeiðloysi kann væntast í summar, eftirsum at ung ofta arbeiða í tænastuvinnuni. Hesin fyrispurningur verður settur fyri at fáa greiði á, hvat landsstýrið ætlar at gera fyri at fyribyrgja ungdómsarbeiðsloysi, og hvat býtið er á teimum, ið nú eru ella hava verið í serligu korona ALS-skipanini.

Á Løgtingi, 11. mai 2020

Hervør Pálsdóttir